# TLAN LLSTØÐU

rdali

**GOLFSTRÍÐ**

*Á økinum oman móti skúlanum og vatninum var ætlanin at gera flogvøll, summarhús og alskyns tænastutilboð. Nú er alt dottið niðurfyri*



**2,75 mió.**
er kravið hjá Páll og Kristinu á Reynatúgvu móti Anfinn Rubek Nielsen.

umsóknir, men sum frá leið fór hann at ivast, ikki minst tí heimsbúskapurin var farin at rilla. Men Páll á Reynatúgvu hevði sagt, at tað hevði ongan týdning, alt fór at verða so mikið bíligari.

– Eg má siga, at eg visti ikki, hvat hetta var, sum eg skrivaði undir uppá, segði Anfinn Rubek Nielsen.

– Tað var ikki fyrr enn seinast í august, at upphæddin fyri jørðina varð nevnd. 4-5 mió. krónur vildi hann ikki hoyra um.

Frá bankanum fekk hann at vita, at teir fingu ikki eina krónu í láni.

Hann hevði so boðið sær til at gjalda Páll og Kristinu á Reynatúgvu 50.000 krónur og gloyma handilin, men Páll á Reynatúgvu hevði sagt, at hann vildi hava alt.

Tað skiltist á Anfinni Rubek Nielsen, at góða vinarlagið millum hann og hjúnini var farið fyri bakka orsakað av hesum handlinum. Hann hevði lítið gott at bera teimum.

### Luftkastellir

– Tað vísti seg, at verkætlanin var ikki annað enn luftkastellir. Ongar tekningar ella nakað.

Hann hevði keypt eina trøð, sum hann skuldi geva Sands kommuna, og seinni hevði hann eisini keypt eini gomul summarhús frá eini eldri konu. Harvið hjálpti hann henni, og hann fekk sjálvur nakað at putlast við sum pensionistur.

Anfinn Rubek Nielsen hevði verið og kannað, hvat jørðin var verd, og hann var komin til tað úrslit, at jørðin var langt frá tað verd, sum Páll á Reynatúgvu kravdi frá honum.

Pástandur hansara var, at hetta var ringasti hagi í Sandoynni, og at hann hevði skrivað undir út frá skeivum fortreytum. Hann helt seg vera lumpaðan.

Metingin av ognini segði, at jørðin var verd 1,8 mió. krónur út frá marknaðarprísi tá. Eftir tí skuldi Anfinn Rubek Nielsen goldið 900.000 krónur.

Nógv varð tosað um upphæddina 2,75 krónur, sum Anfinn Rubek Nielsen verður kravdur eftir. Tað er roknað út til 200-230 krónur fyri gyllinina. Heilt óvanliga høgur prísur, helt eitt umborð fyri Umhvørvisstovuna.

Allur mánadagin fór í rættinum við at viðgera hesa trætuna um jørð.

Fríggjadagin verður dómsviðgerðin.

*randi@sosialurin.fo*



# Lata upp til jólahandilin

**HANDIL** **Norðhús hevur fingið arbeiðið at byggja nýggjan handilsbygning til Føroya Keypssamtøku, og farið verður til verka beinanvegin**

Føroya Keypssamtøka hevur í vikuni gjørt avtalu við byggifelagið P/F Norðhús í Klaksvík um at byggja handilshús á Varpinum. Húsið skal standa norðan fyri Effo.

Húsið verður 1000 fermetrar í einari hædd og verður sostatt næststørsti handilin hjá Føroya Keypssamtøku.

Tað hevur skund fyri Føroya Keypssamtøku, at byggifelagið fer í gongd beinanvegin, tí avtalað er, at handilin skal lata upp til jólahandilin í ár, sigur Finn Nielsen, stjóri í Føroya Keypssamtøku.

Føroya Keypssamtøka hevur í meira enn 30 ár havt ætlanir um at byggja egnan handil í Klaksvík, men altíð er okkurt komið í vegin.

Handilin heldur til í leigaðum hølum, um eru alt ov smá.

– Nú kunnu klaksvíkingar vænta sær ein stóran og góðan handil við væl størri vøruúrvali, sigur Finn Nielsen.

*randi@sosialurin.fo*

# Eingin umsókn til Hvalbiar



*Prestagarðurin í Leirum hevur staðið tómur, síðan Simun Jacobsen fekk starv norðanfjørðs*

**KIRKJA** **Føroya Stiftsstjórn hevur ikki fingið eina einastu umsókn til prestastarvið í Hvalba**

Tað verður lætt at seta prestastørvini í Hvalvik og í Fuglafirði, tí tríggjar umsóknir eru komnar til hvørt starvið.

Eingin av umsøkjarunum er í starvi í Føroyum.

Verri er við starvinum sum sóknarprestur í Hvalba.

Freistin at søkja var úti mánadagin, og tá var eingin umsókn komin inn. Andreas Ziska, stiftsfulltrúi hevur tó góðar vónir um, at starvið fer at verða sett í næstum, tí hann veit um onkran prest, sum umhugsar at søkja.

*randi@sosialurin.fo*